# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Nú eg líti aftur um bak, dugi eg væl at síggja, at eg kundi havt brúkt hepnari orðalag onkuntíð*

*George W. Bush*

# Aung skuldi verið bukað sum eitt óskikkiligt barn

**Aung San Suu Kyi hevur sitið í húsavarðhaldi tey seinastu nógvu árini, men sambært hernaðarstýrinum í Burma er tað ikki nóg mikið**



*Aung San Suu Kyi eigur at fáa harðari revsing enn bara húsavarðhald, skriva bløðini hjá hernaðarstýrinum*

*Savnsmynd*

Í 1990 vann andstøðan valið í Burma, men herurin ógildaði valið og setti leiðaran hjá andstøðuni, Aung San Suu Kyi, í húsavarðhald, og har hevur hon sitið tey flestu árini síðani.

Men tað er eftir øllum at døma ikki nóg mikið. Í dag skriva bløðini, sum vanliga bara endurgeva tað, sum hernaðarstýrið sigur og heldur, at Aung San Su Kyi og aðrir andstøðuleiðarar eiga at fáa harða revsing.

- Fyri tey brotsverk, sum tey hava framt, eiga tey at verða revsa við koyrlasløgum eins og óskikkilig børn, skriva bløðini í dag. Í einari roynd at verja avgerðina hjá hernaðarstýrinum at hava Aung San Suu Kyi sitandi í húsavarðhaldi leggja bløðini hana undir at hava tikið ímóti pengum frá uppreistrarbólkum og útlendskum stjórnum.

Bløðini umrøða leiðararnar í hernaðarstýrinum sum „fólksins foreldur". Sagt verður, at stýrið hevur verið sera tolið við andstøðuni, og at Suu Kyi og onnur andstøðufólk verða hildin í varðhaldi fyri at forða fyri, at tey skulu endurtaka síni brotsverk.

# Obama leitar eftir varamanni

**Minst fimm nøvn verða nú nevnd sum møgulig varaforsetaevni hjá Barrack Obama**

Barrack Obama hevur sagt, at hann fer at geva sær góðar stundir til at finna eitt varaforsetaevni, og eftir øllum at døma hevur hann ikki tikið støðu enn.

Amerikanskir fjølmiðlar siga, at Obama hevur biðið sínar ráðgevar um uppskot, og at teir eftir ætlanini skuldu lata honum uppskotið í dag. Einki er likið út um uppskotini, men tað ljóðar, at har eru fleiri nøvn, og at bæði fyrrverandi tingmenn og fyrrverandi generalar eru á listanum.

Millum teirra, sum hava verið nevndir sum møgulig varaforsetaevni hjá Barrack Obama, eru politikararnir Joe Biden, Chris Dodd, Bill Richardson og John Edwards og fyrrverandi generalurin Wesley Clark, sum eitt skifti var NATO-ovasti í Evropa.



*Barrack Obama hevur fleiri nøvn at velja ímillum, nú hann skal finna sín varaforseta*

*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Generalar stýra Zimbabwe

Andstøðuleiðarin í Zimbabwe, Morgan Tsvangirai, segði í gjár, at í roynd og veru er tað herurin ella rættari sagt generalarnir í herinum, sum stýra landinum. Hann segði, at Robert Mugabe, forseti, fær stuðul frá herinum, og at uttan hendan stuðul hevði forsetin ikki verið førur fyri at krevja umval. Morgan Tsvamngirai segði, at andstøðan fer ikki at góðtaka tað, um tað skuldi hent, at stjórnin fer at lýsa Mugabe sum møguligan vinnara á forsetaumvalinum, sum verður 27. juni. Tsvangirai fekk fleiri atkvøður enn Mugabe á forsetavalinum í vár, men sambært almennu valnevndini fekk hann tó ikki tey neyðugu 50 prosentini, og tí verður umval.



*Morgan Tsvangirai á tíðindafundi í gjár*

*Mynd: AP*

### Fekk skjól í USA

Fleiri túsund fólk komu í gjár saman uttan fyri amerikonsku sendistovuna í boliviska høviðsstaðnum La Paz at mótmæla, at USA gav einum fyrrverandi boliviskum verjumálaráðharra politiskt friðskjól í fjør. Mótmælisfólkið segði, at Carlos Sanchez Berzain fekk politiskt friðskjól í USA, sjálvt um bolivisku myndugleikarnir høvdu skuldsett hann fyri at hava verið við til at senda herin eftir mótmælisfólki í 2003, tá hermenninir skutu umleið 60 mótmælisfólk. Viðurskiftini millum USA og Bolivia hava verið spent leingi, og boliviski sendiharrin í Washington sigur við AP, at málið um fyrrverandi ráðharran ger ikki støðuna betur.